JANUAR

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# 20 AV TEIMUM STÓRU

**Gjøgnumgongd av útvaldum roknskapartølum hjá 20 av teimum stóru fyritøkunum í Føroyum.**

## Um greiningina

Greiningin er gjørd við útgangsstøði í almennu roknskapunum hjá 20 teimum størstu fyritøkunum í Føroyum.

Tá mett hevur verið um støddina á felagnum, er útgangsstøðið tikið í upplýstari nettosølu hjá felagnum.
Fíggjarfeløg, íroknað peningastovnar, tryggingarfeløg o.l. eru ikki tikin við í greiningina.

## Roknskapartøl fyri árini 2013 – 2018

Greiningin er gjørd útfrá almennu roknskapunum hjá feløgunum fyri árini 2013 – 2018. Greiningin samanber vøkstur og vakstrartøl fyri eitt tíðarskeið uppá 5 ár.

## Viðkomandi lyklatøl

Greiningin lýsur gongdina hjá feløgunum við hesum lyklatølum:

- Nettosøla
- EBIT – Margin
- EBIT
- Íløgur
- Nettoskuld

## Feløgini í greiningini

Almennu roknskapirnir hjá fylgjandi feløgum eru nýttir í greiningini.

**Í 2018 hava feløgini havt eina minking í nettosølu, men vøkstur í rakstraravkasti, nettoskuld og størri íløgum samanborið við 2017. Tó má eisini viðmerkjast, at einstøk feløg viga nógv í samlaðu metingini. Verða feløgini hinvegin vektaði eins, so sæst, at feløgini, hvør sær, hava minni rakstraravkast í 2018 samanborið við árið frammanundan.**

# -2,7 %

**Nettosølan minkar**

Nettosølan hjá teimum stórstu fyritøkunum er lækkaður við 2,7% í 2018, ið svarar til 355 mió.kr. 8 feløg hava havt eina lækking í nettosølu í 2018.

Hesi seinastu 5 árini hava annars verið merkt av vøkstri, og er hetta fyrsta árið, har nettosølan minkar.

# 2,2%

**Samlað øking í EBIT**

Hóast EBIT marginan samanlagt hækkar við 2,2%, so er vert at leggja til merkis, at um øll feløgini verða vektað eins, so lækkar EBIT marginan við -7,8% samanborið við 2017.

14 av teimum 20 feløgunum høvdu eina lækking í EBIT, og hevur gongdin verið negativ hesi seinastu 5 árini.

# 5,7%

**Øking í íløgum**

Stóru feløgini hava økt íløgurnar við 5,7% í 2018 samanborið við 2017.

# 6,6%

**Øking í nettoskuld**

Nettoskuldin hjá teimum stóru feløgunum er økt við 6,6% í 2018.

# -2,7 %

Nettosølan í 2018 lækkaði við 2,7% í 2018, samanborið við 2017.
Hetta svarar til eina lækking í nettosølu uppá 355 mió.kr., og er hetta fyrsta árið, seinastu 5 árini, har nettosølan lækkar.

## Vøksturin í nettosølu steðgaði í 2018.

Ein stórur partur av nettosøluni kann tilskrivast einstøkum fyritøkum.
4 av teimum 20 størstu fyritøkunum svara til 45% av samlaðu nettsøluni.

Bakkafrost-samtakið er serstakliga stórt í tí samlaðu myndini (24%).

Samlaða nettosølan lækkaði við 2,66% í mun til undanfarna ár (2017: +7,70%), ið er ein lækking uppá 355 mió.kr.

Tann samlaða nettosølan fyri 2018 er 13,0 mia.kr. (2017: 13,4 mia.kr.).






**Hóast nettosølan minkar, so høvdu 12 av 20 feløgum økta nettosølu.**

Í 2018 vóru 8 feløg ið høvdu minkandi nettosølu (2017: 7). Hinvegin høvdu 3 feløg eina økta nettosølu uppá meira enn 20% (2017: 4).

(í 2014 samaberingini er eitt felag færri, tí hetta varð fyrsta roknskaparárið hjá felagnum)




Um feløgini verða vektað eins, er tó ein øking uppá 2,7%, meðan samlaða nettosølan minkar við 2,7%.

(við meðalvøkstri kann hvørt einstakt felag í mesta lagi hava eina ávirkan uppá 100%).



# 2,2%

## Prosentvís øking í EBIT-Margin í mun til undanfarna ár

Hóast EBIT Marginan pr. felag minkar, so økist samlaða EBIT Marginan fyri feløgini í greiningini við 2,2 prosentstigum.

**Rakstraravkastið hjá fyritøkunum er minkandi.**

EBIT-marginan er økt úr 14,5% í 2017 til 16,7% í 2018. Sæð yvir eitt 5 ára tíðarskeið er gongdin niðurgangandi.

Í meðal fyri hvørt einstakt felag er gongdin niðurgangandi, men tó hava einstøk feløg eina framgongd í EBIT-marginuni.

Niðanfyri eru tey 3 feløgini, ið høvdu størstu prosentvísu økingina í EBIT í mun til 2017.









## Samlaða rakstraravkastið økist aftur

2016 var óvanliga gott, tá hugt verður eftir samlaða rakstraravkastinum hjá feløgunum, og eftir eina afturgongd í 2017, er gongdin aftur positiv í 2018.




## Um feløgini verða vektað eins, so er talan um eitt lækkað rakstraravkast.

Tekur ein hinvegin og vektar øll feløgini eins, so sæst, at talan er um eitt lækkað rakstrarúrslit uppá -7,8%. Tann samlaði vøksturin er tó 11,7%.



# 5,7 %

Øktar íløgur hjá teimum stóru fyritøkunum
Samlað er talan um íløgur fyri 1,8 mia.kr.

## Slakar 1,8 mia.kr. í íløgum í 2018

Tær stóru fyritøkurnar hava brúkt slakar 1,8 mia.kr. í íløgum í 2018 (2017: 1,7 mia.kr.). Hetta svarar til eina øking uppá 5,7%, og hava 11 av 20 fyritøkum gjørt størri íløgur í 2018 samanborið við 2017 (2017: 8 feløg).









## Netto, rentuberandi, skuld økt við 6,6%

Samlaða nettoskuldin hjá fyritøkunum er økt við 6,6%. Verða feløgini hinvegin vektað eins, er talan um eina minking í nettoskuldini uppá -1,8%.

Samanlagt er talan um økta skuld uppá tils. 308 mió.kr.









**Fyrivarni**

Greiningin er bert ætlað sum ein almenn kunning um viðurskifti, ið kunnu hava áhuga, og skal ikki metast sum ráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá teimum upplýsingum, sum eru í greiningini uttan aðra ráðgeving. Vit lata onga váttan ella vissu um rættleikan ella fullkomleikan av teimum upplýsingum, ið eru tiknar við í hesi greiningini.